Eldraráðið í Tórshavnar kommunu
Tórsgøta 21, 100 Tórshavn
eldrarad@torshavn.fo

# Eldraráðið 2021 – 2024

| | |
|---|---|
| Fundur: | Nr. 8 |
| Tíð: | 20-05-2021 kl. 13.00 |
| Stað: | Tilhaldið í Tórsgøtu |

**Møtt:** Julianna Klett, kassameistari, Marin Rasmussen, limur, og Petur Rouch, skrivari.
Tað lá ikki fyri hjá Katrini Holm og Bjørghild Djurhuus at møta. Skotbráið var stutt at kalla inn varalimir.

**Fundarskrá:**

1. Góðkenning av seinastu fundarfrágreiðing
2. Bræv frá Roðanum
3. Ymiskt

AD 1 Góðkenning av seinastu fundarfrágreiðing

Fundarfrágreiðing #7 var lisin og góðkend.

AD 2 Bræv frá Roðanum

Eldrasamstarvið ”Roðin” fyri Runavíkar-, Nes og Sjóar kommunur hevur vent sær til okkara við fyrsipurningi um, at Eldraráðini í Føroyum hittast at samskifta um felags áhugamál. Vit eru vitandi um eldraráð i Klaksvík og Vágunum og halda tað er eitt gott hugskot, at eldraráðini hittast.

AD 3 Ymiskt

Vit eiga øll at lesa Gallupkanningina vit lótu gera í 2019 áðrenn fundin við borgarstjóran, tí har eru góðir upplýsingar um framtíðar bústaðarynski hjá eldri borgarum í kommununi.

Og vit eiga at minna hann á, at vit ynskja fleiri busskýli, har tað er gjørligt.

Fundur lokin klokkan 14:00

Næstu ferð vit hittast er, tá vit fara suður til Vágs at vitja umboð fyri býráði og Ingeborg Vinther , forkvinnu í pensjónistafelagnum í Vágs kommunu.

Tórshavn 22. Mai. 2021.

Petur Rouch, skrivari